Tí›indaskriv:

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givi› út tríggjar bøkur

Barnabókina Í vøggustovu vi› Helenu eftir Maud Heinesen. Annika Lávík myndpr‡ddi.

Helena b‡r í Danmørk. Omman var eitt summari› og vitja›i hana, og tá slapp hon vi› henni í vøggustovuna at síggja stovurnar, øll leikuni, børnini og konurnar, i› arbeiddu har. Í bókini eru vit vi› tvey ára gomlu Helenu í vøggu-stovuni, og gerandisdagurin har er ikki ólíkur okkara: Tey ganga túr, og onkur ansar ikki eftir. So spæla tey, og onkur fær karm, og á útfer› uppliva tey okkurt spennandi.

Í vøggustovu vi› Helenu er 24 sí›ur í litum og hevur stíva permu. Hon kostar kr. 90 í bókabú›unum. Hestprest stó› fyri prentger›ini.

Smábarnabókina Kom og spæl eftir Alix Wood og Jenny Fry.

Fitt, snotulig og stuttlig toybók til tey smæstu, tann fyrsta av sínum slag á føroyskum. Bókin er ætla› at stimbra tey smæstu: Hon er í bjørtum litum, okkurt skramlar, tá i› tú tekur í ta›, og okkurt kann latast upp. Eisini er ein bamsa, fest í ein vogn vil silkibandi, og hana kanst tú spæla vi› og flyta frá sí›u til sí›u.

Kom og spæl er 10 polstra›ar sí›ur í litum. Hon er gjørd úr evni, sum ikki er ska›iligt, so barni› fær ikki mein, hóast ta› bítur í hana. Og ver›ur hon skitin, ber til at vaska hana í flógvum vatni. Bókin kostar kr. 90 í bókabú›unum.

Myndabókina Pippi heldur fø›ingardag eftir Astrid Lindgren. Folt Rettich myndpr‡ddi og Turi› Sigur›ardóttir t‡ddi úr svenskum.

Í hesum døgum n‡tist ikki at koma vi› longum frágrei›ingum um Pippi Langsokk, nú sjónleikurin um hana gongur fyri fullsettum sali í Sjónleikarhúsinum. Nærum hvar tú fert, kenna fólk Pippi, tí ongar a›rar barnabøkur hava vunni› slíka útbrei›slu sum bøkurnar um Pippi. Sí›an tann fyrsta kom út í Svøríki í 1945, eru bøkurnar t‡ddar til næstan 50 ymisk tungumál. Annars eru bøkurnar hjá Astrid Lindgren t‡ddar til 76 ymisk tungumál og seldar í stívliga 80 milliónum eintøkum!

Í hesari myndabókini heldur Pippi fø›ingardagin hjá sær í Villingaváli. Hon bjó›ar Tummasi og Anniku og tey eru sera fegin og spent. Tey hava eisini keypt Pippi eina fø›ingardagsgávu. Tey fáa nógv gott at eta og sjokolátu at drekka, og so fáa tey eisini gávur frá Pippi. Tá i› tey eru li›ug at eta, fara tey at leita eftir spøkilsum uppi á loftinum. Hetta dáma Tummasi og Anniku sera illa, og tey eru eitt sindur bangin. Men Pippi er sterk, so spøkilsini ræ›ast hana. Eftir ein gó›an og langan fø›ingardag fara Tummas og Annika til hús.

Pippi heldur fø›ingardag er 26 sí›ur, innbundin í stíva permu. Hestprent stó› fyri prentger›ini og bókin kostar kr. 90 í bókabú›unum.

Lions Tórshavn b‡tir út gávur

Kurt Hansen frá Lions, Niels Edvard Olsen, umbo› fyri Herbergi› hjá Frelsunarherinum, Finn Nielsen frá Lions, Kári Olsen, Havnar Hornorkestur, Egil Simonsen, umbo›andi Westward Ho, Súsanna Winther Poulsen og Kirsten Ellingsgaard frá ergoterapiini á Landssjúkrahúsinum og Mads Guttesen frá Lions.

Summarsølan og ólavsøkutiltaki› hjá Lions Tórshavn gav so miki› av sær, at høvu›sevni› á novemberfundinum hjá felagnum var at b‡ta út peningin til vælgerandi endamál.

Sluppin Westward Ho er í ringum standi og arbeitt ver›ur í løtuni vi› at útvega pening, so at henda gamla sluppin kann setast í n‡tiligan stand.

Samtykt var› at lata kr. 30.000 til endamáli›.

Herbergi› hjá Frelsunarherinum ger eitt gott arbei›i til tess at hjálpa teimum, sum liva á lívsins skuggasí›u í b‡num. Dag og dagliga hoyra vit um fólk, sum fáa bæ›i mat og song frá Frelsunarherinum. Lions læt Herberginum kr. 17.500,-.

Ergoterapiin á Landssjúkrahúsinum fekk 4 súkklur og 4 fallhjálmar. Heldur enn at fáa pening, valdu tey, sum standa fyri ergoterapiini, súkklurnar, sum tey kunnu brúka í sínum dagliga arbei›i.

Havnar Hornorkestur, sum mangan hevur dugna› Lions, og sum annars ofta hevur sett sín dám á tiltøk, stór sum smá, fekk kr. 5.000,-.

Kirsten Ellingsgaard takkar fyri súkklurnar til ergoterapiina.

VI‹MERKING

Ein grov skuldseting

Kollafjar›ar barnavernd
t. 24.11.2000-11-24
Marian Jacobsen fm.
Gu›run Øregaard, skriv.
Poula Christiansen,
Elsa Rasmussen og
Jónas Johnsson

Mikudagin 22. nov. kl. 18.30 og kl. 23.00 bar útvarp føroya millum anna› tey tí›indi um barnaverndirnar í Føroyum, at tær ísta›in fyri at hjálpa børnunum hava gjørt ta› mótsatta – ta› vil siga hava gjørt børnunum ska›a. Hettar er ein so grov og ljót skuldseting sum vit har›liga átala.

Um hettar er rætt sum sagt bleiv, at hettar var úr eini frágrei›ing sum er komin frá Almanna- og Heilsumálast‡rinum, spyrja vit – nær og hvar og av hvørjum er henda kanning gjørd? Ta› hevur í hvussu so er eingin vent sær til okkum spurt um naka›.

Hugsa mi›larnir ikki um hvussu tey foreldur og børn, sum hava naka› vi› barnaverndirnar at gera mugu kenna seg? At tey hava fingi› ein skelk? Hvar skulu tey í framtí›ini venda sær? Hvørjum skulu tey hava álit á?

Jóla sølustevnan 2000 í Vágs Høll

Mótasýningar
Undirhald
Gallashow
Jólamaðurin vitjar
Nógvir ymiskir framsýnarar

Opið verður:

Hósdagin	30. nov.	kl. 17.30-22.00
Fríggjadagin	01. des.	kl. 17.30-22.00
Leygadagin	02. des.	kl. 14.30-21.00
Sunnudagin	03. des.	kl. 14.30-21.00

Atgongugjald:
Vaksin kr. 40,-
Børn kr. 20,-

1905 VB

Vágs Bótfelag ynskir øllum vælkomin

Sosialurin - 311820